SOSIALURIN

Nr. 30 — 20. APRÍL 1966 — 39 ÁRG.

Fólkaheimið Føroyar

Øll sama og javnbjóðis rætt og líkindi til lærdóms, uttan mun til fíggjarumstøður ella hvar tey í landinum búgva!

Bønir til Sosialin

STERKUR SOSIALISTAFLOKKUR

Tað kann eingin ivi verða um, at fylkingin um og kraftin í sosialistaflokkinum er sterkari enn nakrantíð áður.

Hetta kom týðiliga til sjóndar undir teimum landsfundum, ið hildnir vóru her í Vágum og Vestmanna.

Kraftmiklar røddir talaðu sterkt fyri javnaðarhugsjónini. Hvør í sínum lagi var til reiðar við góðum ráðum og til reiðar at leggja rygg til at gera flokkin og stevnu hansara so máttmikla sum á ongum sinni áður, og tað er einki at ivast í, at hetta verður at eydnast væl. Vit vinna ikki alt á einum sinni, tað vita vit; men stór og háfloygd vóru stevnumálini, og vit ivast ikki í, at vit koma langt fram á leiðini, um tað eydnast okkum aftur at fáa fatur á teymunum, sum aðrir so svikaliga risti okkum av hondum.



Landsfundur javnaðarflokksins hevur gjørt greitt, bæði hvat framtíðarstevnan er, og hvat verður at greiða úr hondum skjótast ella eftir styttri áramáli, tá tað aftur verður flokkinum lagað at koma til róðurs.

Fylking um javnaðarflokkin er sterkasta borgan fyri ríkari framburði í framtíðini.

Fundarmaður.

Brævkassin

Brævkassin
Minnist meg rætt hevur einaferð verið talan um at byggja ein heilt tíðarhóskandi Smiril, sum bæði var størri enn hin 159 fótur stóri Smiril, ið hetta landsstýrið hevur vrakað og sostatt sjálvandi eisini nógv størri enn tað krypulsfarið, ið nú verður bygt.
Hvat var um hetta?
Ferðamaður.

SVAR: Rætt er tað. Longu fyrsta árið F. M. Dam sat sum løgmaður hevði hann frammi uppskot um at byggja eitt fult út nútímans ferðamannafar, ið var 172 fótur langt og skuldi kunna sigla einar 18-20 mil. Uppskotið fall. Hesin Smiril var ætlaður til snarferðasigling kring allar oyggjarnar eins og til skjótar Hetlandsferðir um summarið.

Kikarin

HALIN I AFTURHALDINUM

Um fólkaflokkin í hesum landsstýrinum, sum teir siga hevur framt so miklan framburð og vil so nógv sjálvstýri, skrivaði »14. sept.« á einum sinni:

»Tað er eingin orsok at halda fyri løtuverk, at fólka flokksins mikli tokki til Kr. Djurhuus er storri enn enn sambandsfokksins tokki til hansara. Vit kunnu vera visir í, at fólkaflokkurin altíð vil vera halin í afturhaldsfylkingini mótvegis sonnum framburði — hitt afturhaldandi tjóðrið í tjóðarinnar rembing millum framburð og eldslokking«.

Hotskrinur

ASANI — ASANI — IKKI LAGT NIÐUR, MEN UPP!

Asani-undirtoy er væl kent millum okkara kvinnur. Um sama mundið, sum boðini komu úr Paris um hin »lærstuttu« kjólarnar, hevði danska blaðið Aktuelt samroðu við ein av leiðarunum á Asani-fabrikkunum, og samroðan kom í blaðið undir yvirskriftini »Asani lægger op.«

Aftaná kom hópur av fyrispurningum til fabrikkina, um tað veruliga var rætt, sum stóð í blaðnum, at fabrikkin var hildin uppat — hevði lagt upp.

Blaðið hevði bert skrivað, at orsakað av teimum stuttu kjólunum hevði henda stóra undirtoy-fabrikk hildið seg noydda eisini at leggja upp.

* Har var eingin orsøk til ótta.
* Asani hevur bara lagt upp ein-
* ar tveir centimetur — undir-
* kjólarnar.

* Skilað verður til, at firmaið
* verður ikki niðurlagt. Tað er
* upplagt!

Hon.

M HEIÐURSNAVN
O Fólkaflokkur so føroyskur
L nationalur á sin vís,
A væl unnist honum heiðursnavn
R »Knút Wang & forlýsa«.

Vælsagt!

Tað er royndur veruleiki, at lættlivandi fólk droyma teir heiðurligastu dreymar, men tey heilagu fólkini ofta vakna á kroppi í sveitta. (Freilif Olsen)

* * *

Tað er ófatiligt, at tað skulu finn ast fólk, sum gifta seg, tí tey treingja til frið (Otto Weiss)

* * *

Ein góð gerð verður ikki gjørd nóg ofta. Tað ræður bara um at fáa onkran at gera hana.

Fyrispurningar

1) Nær var Gablatíðin?
2) Nær verða Føroyar amt?
3) Nær kemur lækni á Sandi?
4) Nær var Nólsoyar Páll føddur?
5) Næræ varð skansin oyddur?

(svar aðrastaðni)

Bókin

* er ongum til heiðurs, men
* skomm og skendsil, at før-
* oyskt handverk verður selt av
* landinum til vinnu hjá teim-
* um, ið einki hæva at bjóða
* annarleiðis litaðum enn træl-
* dóm og forbannilsi.

Veitst tú

AT tá ið fólkaflokksmenn í 1946 ikki tordu at taka við loysingini, men í staðin stungu halan millum beinini og rýmdu, var ein umberingin tann, at teir ikki kundu taka loysing, tí teir væntaðu, at Dimmalætting ikki vildi taka lýsingina um loysing upp í blaðið. Há, há, há!!


AT gurkhairnir, sum koma frá Nepal, hava í 150 ár barst við bretum í ymiskum bardøgum. Hesir hermenn eru smáir av vokstri, men ógvuliga djarvir. Fyri luttøku í tveimum heimsbardøgum hava teir ikki fingið færri enn 45.000 heiðursmerki.

AT sum árini eru liðin, hava ikki færri enn 25 miljónir kálvar sæð dagsins ljós í Bretlandi, uttan at faðir og móður hava sætt hvønn annan. Við øðrum orðum má kunstig frukt verða rættiliga nógv brúkt.

AT sølan av sokallaðum konsentreaðum øli vindur stórliga uppá seg í Amerika. Vatn verður latið uppi tað, áðrenn drukkið verður, og sigst hetta ølið at smakka eins og vanligt øl.

AT við hjálp av mikroskopi vita menn nú, at mýrirnar hava 22 tenn.

Krossorð:



Yvir: 1) til køkin 7) siglir 8) fornavn 10) likamslutur 11) illast 14) land 15) í hjalli 16) partafelag 18) seinri.

Niður: 2) klokka 3) fittasta 4) góðgæti 5) spakast 6) stúta 9) frá 14) litur 16) fyrr 17) hjáljóð.

Rímsmiðjan

YVIRTØKULÓTIR

Sum kunnugt hevur Marius kunngjørt á tingi, at hatta við yvirtøkunum vóru bara lótir.

Sjálvstýrið mikið kravdi:
fjarsýn og mánastøðir,
skúlan gjørdan føroyskan
og fleiri húðaskøðir,
Men talar tú í dag
um yvirtøkumál,
tað er eins og tendrað
í sjálvstýrismenn eitt bál.
At bannað uppá á tingið
er Marius sera skjótur,
at alt um yvirtøkur
var bara berar lótir.

SMÁSKEMT



— Nú er hundurin aftur í havanum hjá okkum. Hvat hava tit sett hetta hegnið til?

— Fyri at tit ikki skulu koma inn til okkara.

Børnin

NØVN. Set bókstavarnar annarleiðis saman og tú fært:

OMKIRSIAI
ALKUØJTNAV
GNÍIURTVH

= maður
= fjall
= fiskur


* * *



1— 4 = alda
4— 5 = ávísing
5— 6 = tóni
6—10 = vatn
11—12 = amboð
1—12 = í óveðri

MYNDAGÁTA. Finnið nøvn fyri myndunum. Takið fyrstu bókstavarnar á myndarnøvnunum og setið rætt saman. Tit fáa góðgæti, ið smakkar væl.






* * *

LOYNDARORÐ

Tá orðini niður eftir eru rætt funnin, fært tú á 2. og 4. reglu tvey nýggj orð:



1) veltur 2) viður 3) náa 4) rista 5) feit 6) steinar 7) leingist.

hugskot

SJÁLVSTÝRI— SAMBAND

Hjá teimum, ið siga seg vera serstakar »sjálvstýrisflokkar« burturav, hevur tað altið verið eitt yndisorð at kalla sambandsflokkin og javnaðarflokkin »sambandsflokkar«. Uppi hesa greipu hava teir so til tíðir heft sjálvstýrisflokkin, og tað sama hava tjóðveldismenn eisini gjørt við fólkaflokkin, tá hetta hevur hóskað til teirra kramm.

Sostatt hava allir hesir — ið hvussu er til allar tíðir — verið á »sambandsbásinum«.

Avleið er tað heldur ikki at hefta tjóðveldisflokkin uppí hesa somu greipu, tí eisini tjóðveldisflokkurin hevur tráað uppá »sambandsbásin«; men hitt, at hann ikki slapp, er ein onnur søk.

Undan næstseinastu landsstýrissetu komu hesi boð frá tjóðveldis- og fólkaflokkinum til sambands- og javnaðarflokkin:

»Tjóðveldisflokkurin og fólkaflokkurin eru samdir um at skipa landsstýri saman við sambandsinum og javnaðarflokkinum treyt að av, at Kr. Djurhuus verður løgmaður.«



— Vist eru tað smátingini, ið hava týdning her í livinum. Tú kanst trampa uppi á einum fjalli, men ikki einari teknistift.

* * *

Kæri Petir!

Kom í annaðkvøld. Pápi liggur í seingini. Hann hevur ilt í fótinum.

Tin Petra.

Kæra Petra!

Kann ikki koma. Eg liggi í seingini orsakað av tí sjúka fótinum hjá pápa tínum.

Tin Petur.

* * *

Betri eg kenni menniskjuni, storri virðing fái eg fyri hundunum.



WC og vøsk — tygum verða ikki svikin av okkum

Pf. MARIA POULSEN & Co.

TLF. 2000 TÓRSHAVN TLF. 2001